# Abraham Lincoln og Charles Darwin

FRÍÐTÓR DEBES



Í 1809 tann 12. feb. verða tveir dreingir føddir. Báðir komu at seta djúp spor í søguna. Sjálvandi tosa vit um Abraham Lincoln og Charles Darwin.

200 ár eru ligin í hesum døgum síðani hesir báðir urmælingarnir sóu dagsins ljós. Lívsleið teirra kom at gerast sera ymisk. Avleiðingin av teirra avgerðum og hugsanum komu at ávirka sera nógv menniskju upp gjøgnum tíðina. Enn tann dag í dag síggja vit avleiðingar frá teimum.

**Abraham Lincoln 1809 – 1865**

Sum hin 16. forsetin í USA, so kom Lincoln at taka avgerðir, ið fingu sera stórar avleiðingar fyri amerikanska fólkið. Hann verður roknaður sum størsti og besti forseti, ið USA nakran tíð hevur havt. Avgerðirnar, ið hann tók, komu eisini at kosta honum lívi. Hann doyði av skotsári tann 15. apríl 1865 bert 56 ára gamal. Allur heimurin syrgdi deyða hansara.

Lincoln var m.a. beinleiðis orsøkin til, at trælahaldið fekk mønustingin og at USA sum samveldi yvirlivdi.

Síðstu tíðina hava vit sæð – sjálvt um mong ár skuldu ganga, at dreymurin hjá Lincoln, at vit øll eru líka – óansæð húðalit – er gingin út. Í USA hava vit havt 2 littar uttanríkisráðharrar undir Bush – hin fyrri Colin Powel og síðan C. Rice. Og sjálvandi, so kulmineraði tað tann 20. jan. í ár, tá Obama, sum er littur, gjørdist tann 44. amerikanski forsetin – júst 200 ár eftir at Lincoln varð føddur.

**Charles Darwin – 1809 – 1882**

Á ungum árum gjørdist Darwin forsprákari fyri menningarlæruni, ið kom at fáa sera víðfevndar avleiðingar fyri mannaheimin. Ein maður sat í London, Karl Marx at navni, og skrivaði Das Kapital og svølgdi øllum tí rátt, ið Darwin skrivaði. Hetta kom at fáa vanlukkuligar fylgjur fyri heimin. Hetta, ið Darwin skrivaði, passaði væl inn í læru hansara – at alt lív stavar frá materiuni – og at tað sterka altíð yvirlivir ella vinnur hitt veika. Hetta hóvaði Marx sera væl og implimenteraði hann hetta bæði væl og virðiliga inn í sítt kommunistiska manifest. Marx var so glaður fyri læru Darwins, at hann ætlaði at ogna Darwini 2. bind av Das Kapital, men hetta gjørdist av ongum. Lenin og Stalin tóku eisini væl móti hesi læru – og søgan sigur okkum, at Stalin drap uml. 60 mill. fólk tey árini hann sat við stýri.

Eisini síggja vit henda hugsunarhátt hjá Hitler – har náttúran lærir okkum, at hitt sterka altíð vinnur. Hetta fekk ræðuligar avleiðingar fyri stóra partin av heiminum – ikki minst fyri jødafólkið, ið noyddist at ofra uml. 6. mill. mannalív til hesa ørsku.

So vit síggja, at minst 4 av heimsins ismun hava tikið hetta til sín: kommunisman, nazisman, facisman og kapitalisman.

Løgið, sum lívið kann hátta seg – hin eini til stóra signing fyri heimin, meðan læran hjá hinum fær vanlukkuligar avleiðingar fyri millióna lív – tí menn, ið vilja skaða heimin – taka læruna til sín, til sín egna fyrimun. Eg hugsi, at hevði Darwin vita tær avleiðingar, ið læra hansara fekk, so hevði hann hugsað seg um tvær ferðir – áðrenn hann skrivaði tað, ið hann skrivaði.





# Jú, Rósa Samuelsen – Sparingarnar fáa álvarsamar fylgjur

JARVIN FEILBERG HANSEN

Formaður í Føroya pedagogfelag



Landsstýrskvinnan í Almannamálum. Rósa Samuelsen, gjørdi herfyri púra greitt, at sparingarnar fóru ikki at raka stovnarnar undir Nærverkinum. Trivnaðartænastan fekk boð um at spara 2.3 milliónir – og nú er so avleiðingin tann, at Sambýlið í Pætursgøtu verður niðurlagt. 3-4 fólk við Asbergar Syndromi, hava búð á Sambýlinum, men verða hesi nú flutt í onkran annan bústað. Starvsfólkini á stovninum fáa boðið annað starv og taka tey ikki av, so verða tey uppsøgd.

Sosialurin hevði í blaðnum leygadagin tann 14. februar viðtalu við ein av teimum avvarðandi á stovninum. Hesin varð, sum vera man, ógvuliga skelkaður av avgerðini um, at stovnurin skuldi lata aftur. Hetta er ikki bert ein stovnur, men eisini eitt heim fyri tey, sum búgva har. Hesi hava ikki havt møguleikan at koma við viðmerkingum til avgerðina, og starvsfólkini hava heldur ikki verið við í hesari tilgongdini. Soleiðis hevur demokratiska skipanin valt at arbeiða. Ongin má verða hoyrdur, og tað er "tyss tyss" allan vegin ígjøgnum.

Tað kemur somuleiðis fram í greinini, at tað er eitt stórt afturstig at flyta hesi búfólkini, tí tey hava góðar, tryggar karmar at búgva og virka undir – og at fara og broyta uppá hesi grunnleggjandi viðurskiftini hjá búfólkunum kunnu eisini føra til stór afturstig fyri búfólkini.

Starvsfólkini, sum hava starvast á stovninum eru ikki tikin við upp á ráð, og hava staðiliga afturvíst hesi ætlan, men her hevur man so **ikki** valt at lurta eftir serkunnleikanum. Ótrúligt má sigast, tí man hevur upparbeitt ein serkunnleika á stovninum, tí hetta er tað einasta sambýlið, ið er ætlað fólki við Asbergar Syndrom.

**Setunarsteðgur**

Síðsta fríggjadag fingu 24 nýggir námsfrøðingar prógv á Føroya Læraraskúla. Stórur tørvur er á námsfrøðingum í Føroyum, so ein skuldi væntað, at tað ikki er nakar trupulleiki hjá hesum 24 at fáa starv. Men so er tíanverri ikki. Teir námsfrøðingar, sum hava ætlanir um at starvast innan Trivnaðartænastuna, fáa onki fast starv, tí setanarsteðgur er á økinum. Onki fast starv verður sett fyribils, so tað er lítið hugaligt at standa við einum góðum pappíri í hondini, sum skuldi givið atgongd til nógv størv innan námsfrøðiliga økið, og fáa at vita, at onki starv verður lyst leyst.

Samgongan hevur tosað um týdningin av einum góðum útbúgvingarverki. Vit hava upplivað, hvussu Setrið er viðfarið – og nú síggja vit so at fólk við útbúgving ikki kunnu fáa tey størv tey hava krav uppá. Hvat hendir við hesum fólkunum, vita vit ikki, men eg vænti ikki, at tey tíma at ganga arbeiðsleys her í Føroyum.

# Seriøsir dialogar?

JENIS AV RANA



Í Dimmalætting leygardagin verða viðmerkingar til grein mína í fjølmiðlunum fyrr í vikuni endurgivnar. Eg meti hesar viðmerkingar lýsa støðið, felagsskapurin Dialogos virkar á, sera væl. Loyvi mær tí stutt nakrar samanberingar millum tað, eg skrivaði og tað, eg verði sagdur hava skrivað.

**Áheitan mín**

Í greinini heitti eg á: ....tey handan Dialogos, bæði trúgvandi, eins væl og teirra, ið beinleiðis avnokta trúnna ....

- hetta fáa tey í Dialogos til: ... Jenis leggur upp til, at vit handan Dialogos ikki eru trúgvandi.

Seriøs niðurstøða?

**Undirskrift mín**

Grein mína undirskrivaði eg við navni mínum og sendi hana til dimmu, norðlýsið, oyggjatíðindi, vágaportalin, sosialin og heimasíðu miðfloksins. ***Ein av sjey***, Dimmalætting, velur av sínum eintingum at seta heitið, formaður Miðfloksins, eftir navn mítt.

- hetta fáa tey í Dialogos til: ... Jenis undirskrivar seg sum formann Miðfloksins. Er tað veruliga embætið Miðfloksins at leggja seg út í eitt kjak sum hetta? Tað tykist sera óhóskandi fyri ein politiskan flokk at gera soleiðis.

Nøktandi granska ?

**Heitið á greinini**

Eg valdi at nevna greinina: Snildi ormsins- ein stór tøkk og ein viðmerking.

- hetta fáa tey í Dialogos til: ... Jenis... samanber okkum við satan í titlinum.

Virðilig skuldseting?

Eg vóni, at tey í Dialogos eru meira nærløgd í gransking teirra av skriftum, heiløgum og ikki, enn tey eru í viðgerð teirra av stuttu grein míni.

# Snildi ormsins- ein stór tøkk og ein viðmerking

JENIS AV RANA



Tøkkin gongur til Svein Askildsen fyri viðmerking hansara til teirra, ið standa handan felagsskapin Dialogus. Tú kennir, at orðini koma úr einum hjarta, sum elskar Frelsaran og sum harmast, tá roynt verður at sáa iva um einføldu trúnna, Bíblian boðar.

Viðmerkingin er primert til svarið Svein far í Dimmu leygardagin. Snildisliga verða hugtøk vavd saman í royndini at gera menningarlæruna borðbara. Hetta sæst í sætta og sjeynda reglubroti, har hildið verður fast um páhaldið, at menningarlæran er og enntá dagliga verður prógvað. Men tá prógvini skulu førast, so verður bráddliga orðið vísindi brúkt aftur og aftur ístaðin fyri orðið menningarlæra, sum um talan er um eitt og tað sama.

Og tað er júst har vinir okra í Dialogos fara út av kós og gera grundleggjandi feilir sínar, tí vísind og menningarlæra hava als einki við hvønn annan at gera!

Hvønn dag virka vælútbúgvin trúgvandi um allan heim, eisini í Føroyum og í brøðrasamkomuni ( sum tykist standa fyri skotum), á vísindarligum grundarstøði, innan allar partar av vísind. Og neyvan hevur nakar okra trupulleikar við hesum virksemi, kanska tvørturímóti, tí vit gleðast yvir hann, sum bæði er grundarlagið undir trúgv okra og undir tí skaparverki, sum øll vísind hvílir á. Men eins trygg okur eru við ta vísind, Skaparin stendur aftanfyri, eins ótrygg, milt sagt, munnu flestu okra kenna okkum við sokallaðu menningarlæruna, sum als einki hevur við vísind at gera, og enn minni við Harra vísindarinnar!

Menningarlæran, incl. apuhugsanir Darwins, er í besta føri vánaligar hypotesir, sum ein og hvør sjálvandi er frælsur at hava sínar hugsanir um. Men fátækur og ótryggur ert tú, um tú byggir, heilt ella partvíst, á hesar. Og ætlar tú tær at føra prógv fyri teimum, kemur tú at stríðast bæði leingi og úrslitaleyst, tí hvørki vísind ella trúgv koma tær til hjálpar.

Míni ráð til tey handan Dialogus, bæði trúgvandi, eins væl og teirra, ið beinleiðis avnokta trúnna eru, at tit sælu um og velja hin góðu lutin eina. Væl er hann lítismettur av summum, men hann heldur- bæði her og inn í ævinleikan. Og tað er hóast alt tað nógv týdningarmesta.